# FM í reiðskapi og stakgreinum í Runavík

**Okkara kendasti fimleikari, Helgi Winther Olsen, sum vann fleiri gullmerki á seinastu oyggjaleikunum, verður við í FM-kappingini í fimleiki í Runavík um vikuskiftið**



*Helgi Winther Olsen verður við í FM-kappingini í fimleiki í Runavík um vikuskiftið*

FIMLEIKUR
*Vilmund Jacobsen*

Leygardagin verður føroyameistarakapping í fimleiki í Ítróttarhøllini í Runavík fyri tey, sum eru 14 ár og eldri. Trý feløg fara at luttaka í hesi kapping; tey eru Ljósið úr Havn, Havnar Fimleikarfelag og Støkk av Glyvrum.

Tey, sum eru við í hesi kapping, eru seks tey bestu úr hvørjum bólki, sum hava kvalifiserað seg til FM. Hesi hava luttikið í øllum greinum í reiðskapsfimleiki.

Tann, sum vinnur samanlagt í øllum greinum, verður føroyameistari í fimleiki.

Kendasta navnið í føroyskum fimleiki í dag, er Helgi Winther Olsen, sum vann fleiri gullmerki á oyggjaleikunum á Isle of Man seinasta summar. Hann kemur heim úr Danmark at verða við í FM-kappingini leygardagin.

Ilt er at siga, um aðrir fimleikarar eru førir fyri at geva Helga mótstøðu, men tey, sum standa fimleikinum nær, vænta at síggja fleiri spennandi kappingar.

Kappingin leygardagin byrjar kl. 14.

## Stakgreinir

Sum nakað nýtt, verður sunnudagin skipað fyri FM-kapping í stakgreinum. Her kanst tú gerast meistari í eini ávísari grein, t.d. í ringunum, lopum, á gólvinum ella í bitanum.

Hugskotið til hesa kapping er sprottið úr, at tað eru fleiri smá fimleikarfeløg, sum ikki hava møguleika at kvalifisera seg til FM. Hesir leikarar kunnu sunnudagin vísa sínar dygdir í einstøkum greinum.

Tey, sum eru við sunnudagin, hava kvalifiserað seg til hesa kapping gjøgnum liðkappingina í fimleiki, sum varð liðug fyrr í hesum mánaðinum.

Tey feløg, sum ikki eru við til FM í reiðskapi leygardagin, men sum í staðin hava møguleika at verða við sunnudagin, eru Klaksvíkar Fimleikarfelag, Flog úr Fuglafirði, Fok úr Gøtu/Leirvík og Tvøroyrar Fimleikarfelag.

Endamálið við stakgreinakappingini sunnudagin er eisini at halda hesum feløgum til, sum ikki megna at kvalifisera seg til FM í reiðskapsfimleiki.

Fimleikasambandið vónar at síggja meira til hesi feløg komandi vetur og í framtíðini annars.

Kappingin sunnudagin byrjar eisini kl. 14.

Vikuskiftið, 4. og 5. mai, verður kappast í yngru deildunum í Havn, og tá verða kappingarnar skipaðar á sama hátt sum í Runavík leygardagin og sunnudagin.

# Sølustevnan á Sandi útsett

TILTØK
*Vilmund Jacobsen*



*Aftur í ár er sølustevnan á Sandi rakt av verkfalli*

Hóast vit hava havt og framvegis hava góðar tíðir í Føroyum, er samfelagið kortini fleiri ferðir rakt av verkfalli seinasta árini. Orsøkin er væl saktans, at fakfeløg vænta sær meira í góðum tíðum enn ringum tíðum. Feløgini halda, at í ringu tíðunum fingu tey ov lítið uppá lønina og vilja tískil vinna so mikið meira innaftur, meðan tíðirnar enn eru góðar.

Úrslitið er, at mong ósek eru rakt, sum í veruleikanum einki hava við stríðið millum partarnar at gera.

Fólk argast, tí hetta gongur út yvir teirra gerandisdag, men tað loysir ikki trætuna. Hana kunnu bara partarnir, sum eru ósamdir, loysa.

Stríðið má taka ta tíð, tað tekur.

**Sølustevnan á Sandi útsett**

Ein avleiðing av verkfallinum hesaferð er, at árliga sølustevnan, sum áhugafelagið hjá B71skipar fyri í Meginskúlanum á Sandi, er útsett.

Ætlandi skuldi stevnan vera komandi vikuskiftið, men tað letur seg ikki gera, nú eingin sigling er um Skopunarfjørð.

Áhugafelagið hevur tí boðað luttakarunum frá, at sølustevnan í staðin verður vikuskiftið, 18. og 19. mai, um komandi verður um fjørðin til ta tíð.

Seinasta ár var eisini verkfall, tá ið sølustevnan var á Sandi; tá var tað Føroya Arbeiðarafelag, sum togaðist við Føroya Arbeiðsgevarafelag um lønarsáttmála.

Torført var hjá framsýnarum, sum skuldu í Sandoynna við vørum til stevnuna, at sleppa um vegbyrgingarnar í Kollafirði, men tað eydnaðist umsíðir eftir togan við verkfallsvaktirnar. Tá ið komið var í Sandoynna, vistu fólk ikki, um tey sluppu heimaftur við vørunum.

Hesaferð er sølustevnan hjá B71 so aftur rakt av verkfalli.



Politiskur kvinnufundur í Klaksvík:

# Mítt føðiland – eisini fyri kvinnur



*Nógvir spurningar vóru settir kvinnuligu valevnunum á politiska fundinum í Klaksvík*

**Ansingartrygd, eldrarøkt, undirsjóvartunnil og flóttafólk vóru bert nøkur av framløgdu evnunum, tá Áhugabólkur Klaksvíkar Húsmøðrafelags í vikuni skipaði fyri almennum politiskum fundi við teim kvinnuligu løgtingsvalevnunum í Norðoyggjum**

LØGTINGSVAL
*Ragnhild Ellingsgaard*

**Klaksvík:** Kaffi og smákøkur stóðu á borðinum, tá kvinnur í hópatali tustu inn í hølini hjá Klaksvíkar Húsmøðrafelag. Endamálið var at hoyra, hvat tey kvinnuligu valevnini í Norðoyggjum høvdu uppá hjartað.

10 kvinnulig valevni hava í Norðoyggjum stilla upp til komandi løgtingsval, og av teimum luttóku 7 á hesum fundi.

Áhugabólkur Klaksvíkar Húsmøðrafelags hevur í fleiri undanfarin ár skipað fyri líknandi fundum áðrenn býráðs- og løgtingsval, og hevur undirtøkan verið framúr góð hvørja ferð. Og so var eisini hetta kvøldið.

Um 100 kvinnur leitaðu sær inn í fjálga hølið saman við teim kvinnuligu valevnunum, og prátað varð av øllum huga um tey ymsu evnini, sum nú einaferð stinga seg upp, tá eitt val nærkast.

## Bleyt virði í hásæti

Eftir eina lítla løtu varð bjóðað vælkomin við einum felagssangi, og síðan fekk hvør flokkur 10 minuttir til at siga frá, hvat júst tey ætla at leggja dent á í komandi valskeiði.

Og tað vóru ikki tey stóru búskaparligu orðini, sum her komu fram. Heldur varð dentur lagdur á tey sokallaðu bleytu virðini, her undir barnaansing, ungdóms- og familjupolitikk og eldrarøkt.

Men eisini undirsjóvartunnilin fekk nøkur orð á vegnum. Tosað var um bæði tær góðu og minni góðu avleiðingar, sum kunnu standast av honum, og um hvussu norðoyingar eiga at fyrireika seg upp á hetta.

Eisini varð tosað um Klaksvíkar Sjúkrahús, sum flest øll valevnini vóru samd um skuldi fáa betri sømdir, soleiðis at sjúkrahúsið eisini kemur at hava týdning fyri onnur enn bert norðoyingar.

Allar vóru eisini samdar um, at tey bleytu virðini hava ligið krógvaði í alt for langa tíð. Tí var tíðin nú komin til at velja kvinnur inn á ting, so at eitt slag av javnvág kundi koma í landsins stýri, og tey bleytu virðini verða tikin meiri álvarsamt.

Framleggingin hjá flokkunum gekk skjótt og væl, og so varð boðið til kaffi og smákøkur.

## Drúgt orðaskifti

Í stutta steðginum gekk prátið dúgliga millum borðini, og tey umrøddu evnini komu øll upp at venda nakrar ferðir. Og eingin talaði um, at búskapurin og vinnan høvdu fingið ov lítið av plássi í framleggingunum. Heldur sýntust kvinnurnar at verða fegnar um endiliga at sleppa at tosa um evni, ið kvinnur sum oftast brenna serliga fyri.

Eftir steðgin varð skipað fyri einum orðaskifti við orðstýrara, har møguleiki var hjá øllum at seta valevnunum spurningar av ymsum slag.

Long tíð gekk, áðrenn fyrstu spurningur kom fram, men so kom eisini ferð á.

Serliga spurningar viðvíkjandi barnaansing og flóttafólkapolitikki skaptu kjak millum bæði valevni og áhoyrarar, men eisini spurningar viðvíkjandi føroyska búskapinum høvdu áhuga millum kvinnuligu áhoyrarnar.

Hetta orðaskifti tók drúgva tíð, og ikki fyrr enn klokkan 23.00 endaði fundurin, sum byrjaði klokkan 19.30.

Men tá høvdu flestu áhoyrarnir eisini havt ríkan møguleika fyri at finna útav, hvør skuldi fara avstað við júst teirra atkvøðu á komandi løgtingsvalinum.



*Hóast hetta var ein politiskur fundur, so hugnaðu kvinnuligu áhoyrarnir sær saman*



*Heilt fitt av kvinnum høvdu leitað sær inn í hølini hjá Klaksvíkar Húsmøðrafelag*